Skills 4 ReUse

Nordic Sustainable Construction



# Læraravegleiðing: Viður – eitt genialt tilfar

**Evni**

- Fakligt innihald um træ – bæði í tí ringrásar og linjurætta búskapinum

**Mælt tíðarlongd**

- 60 min + 30 min (Quiz)

**Viður**

Undirvísingartilfar til skeið um endurnýtsluviður í bygging

## Innleiðsla

Moduli er innleiðandi og hevur til endamáls at geva luttakaranum innlit í, hví tað er so týdningarmikið at økja ringrásin av træ. Sum stuðul til hetta verður givin fakta um trænýtslu og møguleikarnar fyri endurnýtslu í ymiskum træsløgum, umframt handfaringina og møguleikarnar hjá luttakaranum at gera ein positivan mun. Sum stuðul til hetta verður eisini givin ein yvirskipað innleiðsla til galdandi politikkir og mál, sum eru til fyri at økja endurnýtsluna av træ í mun til dagsins støði. Tað verður víst, at marknaðurin bert er byrjaður umleggingina.

Lærlingurin skal reflektera yvir, hvussu man ger snið, byggir og handlar á byggiplássinum/í verkstaðnum, umframt hvussu man brýtur niður (handfaring, sortering, heilsuviðurskifti) og skermar træið við atliti til tess cirkulera potentiali. Træ hevur ymiskar cirkulera potentialir treytað av træslagi, atkomumøguleika, formi og stødd, samanseting við onnur tilfar, ávirkan av umhvørvisdálking, umframt infrastrukturale og búskaparligar faktorar.

## Fyrireiking

- Lærarin eigur at vera kunnugur við ferðina hjá viði bæði í tí linjurætta og ringrása búskaparliga modellinum.
- Lærarin eigur eisini at vera kunnugur við hugtøkini innan ferðina hjá viði í linjurætta og ringrása búskapinum. Hygg møguliga eftir hugtakslistanum.

# Læraravegleiðing: Viður – eitt genialt tilfar

## Læringamál

- Lærlingurin kann leggja týdningarmikil faklig hugtøk fram (V1).
- Lærlingurin kann velja røtt faklig hugtøk til at lýsa endurnýtslu og endurvinning (F2).
- Lærlingurin kann yvirskipað lýsa, hvørjar træliður eru í søguligari bygging frá teimum seinastu 60 árunum (V1).
- Lærlingurin kann greiða frá samanhanginum millum træframleiðslu og mangul uppá trævørur (V2).
- Lærlingurin kann lýsa grundleggjandi lóggávu um ábyrgdarfulla skógarnýtslu (European Timber Regulations) (V1).Lærlingurin kann vísa á trætilfeingi í verandi byggingarmassa (V1).
- Lærlingurin kann greiða frá møguligu endurnýtsluførleikanum hjá trætilfeinginum í verandi byggingarevni (V2).
- Lærlingurin kann lýsa ferðina hjá trævørum í einum lívsskeiðsperspektivi (V1).
- Lærlingurin fær fatan av virðisskapan ígjøgnum endurnýtslu og endurvinning og kann greiða frá fyrimununum (V2).

## Innihald og endamál

<u>Framløga frá læraranum (5 min)</u>

- Yvirskipað endamál – hvat skulu lærlingarnir fáa burturúr við at leita runt á eini heimasíðu í hálvan tíma?
- Framløga av partinum ”VIÐUR" og skjót gjøgnumgongd av, hvussu síðan er skipað.
- Greið frá um uppgávuni, at lærlingarnir skulu skriva tey trý "týdningarmestu" fakligu hugtøkini.

<u>Sjálvlestur (30 min)</u>

- Lærlingurin kannar heimasíðuna á egnan máta.
- Lærlingurin skrivar tey trý "týdningarmestu" fakligu hugtøkini, sum tey hava hitt á vegnum, og fyrireikar seg til at kunna grundgeva fyri sínum vali.

<u>Samandráttur í felag (25 min)</u>

- Svarini hjá lærlingunum verða víst á stórskíggja.
- Lærlingarnir skulu grundgeva fyri sínum valum, og tað verður vitanardeiling og kjak í felag.
- Arbeiðið verður gjørt tvey og tvey við at velja hugtaksavgreiðingar til ein felags hugtakslista um viður í CE.
- Spurningar?

# Læraravegleiðing: Viður – eitt genialt tilfar

- Quiz (30 min)

1. Lærarin leggur quizina fram.
2. Lærlingarnir gjøgnumføra quizina á heimasíðuni.
3. Úrslitini frá quizini verða samanumtikin í felag.

## Sundurgreining

- Undirvísingarevnið kann sundurgreinast við at lærarin kann velja at halda fram ella sleppa hugtakslistunum.
- Tilfeingismongdirnar fyri træ og munir millum træsløg í ymiskum londum skulu takast við, og tess ávirkan á veðurlag og umhvørvi kann tískil broytast frá landi til landi.

## Feedback og meting

Teir fakligu hugtakslistarnir og eftirfylgjandi forkláringar av hugtøkunum geva læraranum møguleika at meta um kunnleiksútbýtið hjá lærlingunum, og samanumtøkan í felag gevur samstundis lærlingunum møguleika at geva feedback.